LM-099/2023

Fylgiskjal 20

Viðmerkingar til Lóg um Burðardygga Ferðavinnu

Fyrst vil eg siga, at eg fegnist um, at politiska skipanin endiliga fer inn og hyggur eftir avbjóðingini og møguleikunum í ferðavinnuni í Føroyum.

Eg havi starvast sum sjálvstøðug vinnurekandi innan ferðavinnu í Føroyum síðani 2018 harav búð í Mykinesi og rikið ferðavinnuvirksemi har frá 2019-2023 fimm sesongir.

Eg havi arbeitt við burðardygd síðani 1997, tá eg skrivaði høvuðsuppgávu um burðardygga ferðavinnu í Mykinesi í samband við mín lesnað sum akademiøkonom í ferðavinnu.

Eftir at hava verið fimm ár í Mykinesi og sæð ógvusliga vøksturin og manglandi stýring av ferðavinnuni har, bæði sum íbúgvi og vinnurekandi, havi eg ynski um at koma við mínum viðmerkingum til lógaruppskotið um burðardygga ferðavinnu.

Eg haldi at Lóg um Burðardygga Ferðavinnu og burðardygdargjald skurrar og hevði orðingin "Umhvørvisgjald" verið lættari at skilja, serliga fyri okkara gestir.

Stórar arbjóðingar eru hjá kommunum við WC, kloakk, reinum vatni og ruski av ferðavinnuni. T.d. í Mykinesi og Saksun er ongin ordilig kloakk og er hetta sera ótespiligt um summarið, tá í t.d. Mykinesi vitja dagliga uml. 150-200 ferðafólk í einari bygd, har einans 13 skrásettir íbúgvar eru. Umhvørvisgjaldið kundi t.d. farið til kommununa at gera slíkar fasilitetir. Kommunan hevur fíggjað ein mann burturav til at vaska WC alt summarið, hetta uttan gjald frá gongugjøldum, sum vera kravd inn av hagunum í Mykinesi. So at partur av gongugjaldi fer til kommunu og íbúgvar er sera passandi. Eitt uppskot var at kundi verið 1/3 til eigarar, 1/3 til skelting og gøtur og 1/3 til kommunu og íbúgvar.

Í dag er krav um ferðaleiðara í Mykinesi og hevur hetta bøtt nógv um at fuglalív og lundaland verður vart og gestir halda seg á gøtuni.

Mykines er Ramsarøki. Túrurin kostar 400,- kr. og av hesum fara 250,- til hagan og 150,- til annað, m.a. ferðaleiðara. Ein prísáseting, sum ikki gevur meining, tá hetta er mest attraktiva oyggj í Føroyum.

Í 2024 er onki sagt um avmarking av ferðafólki til oynna og SSL siglir nú 3 túrar til oynna frá maj til august. Her er ynskiligt, at man setur avmarkingar á fyri at verja fugl, lendi og íbúgvar. Gjøld í sær sjálvum eru ikki burðardygg annað enn fíggjarliga, men sosiala og umvørvisliga burðardygdin er ikki umfatað her. Einasti háttur, at fáa umhvørvisliga og sosiala burðardygd er at hava ferðaleiðarar at ansa eftir náttúru og fuglalívi og involvera lokalar íbúgvar í menningini og ætlanini fyri oynna. Sum er í dag, verður alt stýrt av jarðeiðarum, eisini eigarum, sum als ikki búgva í oynni. Tí fegnist eg um, at lógaruppskotið leggur upp til, at lokalir íbúgvar skulu vera við og hoyrast.

Paragraf 2,11

Har stendur gjald 120,- aðrastaðni stendur 150,-.

Paragraf 4

Ynskiligt at eisini ferðsla við Rib bátum á Sjógvi verður nevnd her fyri at m.a. verja lunda og annan fugl á sjónum frá maj til august. Einans ramsar oyggjar eru vardar í dag við max. 8 mil ferð innanfyri 500 metrar úr landi. Fuglur er á sjónum kring allar oyggjar í Føroyum og burdi hendan ferðin verið sama kring allar Føroyar frá maj til august fyri at verja sjófugl.

Sama burdi man nevnd at ATV ferðsla í høgunum kring Føroyar einans er loyvd bónda og í samband við landbúnað. Vit síggja fleiri og fleiri koyra stuttleikakoyring í fjøllunum við ATV tá heiðafuglurin reiðrast, sera syrgiligt at síggja.

Paragraf 6, stk. 3 - 6

Landbúnaður og ferðavinna kunnu í besta føri fáa gleði hvør av øðrum, men týdningarmest er náttúran og at hon verður vard. Kongsfestið í Mykinesi fer helst til sølu í ár, tí festarin fyllir 70 ár. Største lundalandið i Føroyum, Lamba, økið oman til brúnna út í Mykineshólm, er partur av hesum festinum. Ynskiligt var, at Lamba og Mykineshólmur blivu Tjóðargarður, Fuglareseravat fyri at verja lundan og súluna í Mykineshólmi. Eisini er syldur drunnhvíti í Mykineshólmi. Í dag ganga 25 veðrar í fitilendi í stórsta lundalandinum í Føroyum, tað gevur ikki meining, tað órógvar eins nógv og turistar. Leiðin er lukkað orsakað av einum omanlopi, men yvirfriðingarnevndin hevur loyvt at flyta gøtuna oman gjøgnum Lamba. Eg skilji tað ikki, at man vil loyva hundraðtals ferðafólki at ganga gjøgnum lundaland í bútíðini, hvar er virðingin og verjan av fuglinum? Lundar eru kring alt Mykines, man nýtist ikki at ganga í Lamba fyri at síggja lunda. Eg ynski mær, at landið við støði í nýggju náttúruverndarlógini tekur Lamba og Mykineshólm til Tjóðargarð/fuglareservat og fjernar seyðin har. Vitaverkið er eisini yvirtikið so Hólmahúsini kundu blivið granskingarstøð fyri dýrabara fuglalívið har.

Paragraf 5, 3
Standardavtala, sum er galdandi fyri virksemi eftir stk. 1.

Her haldi eg ikki, at man kann gera eina standardavtalu fyri allar Føroyar. Munur er á attraktiónsvirðinum og náttúrusárbærinum kring Føroyar. Hetta snýr seg um útboð og eftirspurning og um man skal avmarka ferðafólkatal t.d. har fuglur er onkrastaðni og aðrastaðni seta gjøld eftir, hvørjar íløgur skulu gerast. Involvera lokalar íbúgvar, tey, sum varða av jørðini og kommunur í hetta.

Paragraf , 7 stk. 2
Ikki allar bygdir hava staðbundnar nevndir, t.d. hevur Mykines onga staðbundna nevnd. Man kundi t.d. brúkt Ramsarnevndina har talan er um Ramsaroyggj og ongin staðbundin nevnd er.

Paragraf 8, stk. 3

Kommunur ábyrgd av at halda gomlu bygdagøturnar.

Summar kommunur hava ikki eingongd kloakk til ferðafólkini, hava tær pening til bygdagøturnar? Vænti ikki hetta fer at virka í verki.

Paragraf 12

Her stendur bara gjaldsportur. Men hvat við hegni og píkatráði uttan trin og portur? Hetta má skrivast inn í hesa paragraffina.

Paragraf 13

Ynskiligt at Náttúrugjald verður broytt til Umhvørvisgjald, tí tá dekkar tað allar 3 burðardygdirnar. Fysiska burðardygdin fevnir eisini um undirstøðukervið, wc, kloakk, rusk, reint vatn o.s.fr.

Paragraf 17
At bara fjerna paragraf 41-43 úr Lov for Færøerne om Hegn og Markfred frá 1937 er sera óumhugsað og tekur inntøkugrundarlag frá lokalum festibøndum at fáa inntøku av og skipa ferðavinnuna, harumframt hevur tað sera neilig árin á landbúnaðin og seyðahaldið og tær skipanir, sum eru har.

Fleiri staðni í landinum eru skipanir komnar, sum virka í dag, her kann nevnast Mykines, Trælanípa, Dunnisdrangar og Kallurin.

Lokala ferðavinnan hevur avtalur og samstarv við hesar bøndur og tað virkar í dag, um vit við hóskandi freist fáa treytirnar at vita.

Týdningarmest er at tryggja føroyingum frítt at ferðast í føroysku fjøllunum.

Vit uppliva fleiri og fleiri útlendskar ferðavinnuveitarar agera sum ferðaleiðarar í føroysku høgunum og fer nýggja lógin at elva til meira av hesum virkseminum til skaða fyri ferðaleiðarar og føroyskar ferðavinnuveitarar. **Tí, hvør skal halda skil á, hvør fer í hagan og ikki? Hvussu fer tað at rigga í praksis?**

Hví skulu útlendingar keypa túr frá mær og bóndum og øðrum gongutúraveitarum, tá hendan lógin loyvir teimum at fara uttan ferðaleiðara?

Eg sum ferðavinnuveitari skal gera avtalu við bøndur og ognarar og gjalda fyri hetta, meðan útlendsk ferðafólk gjalda 150,- kr. við landamarkið og fáa loyvi fyri hetta gjald at fara allastaðni, uttan kostnað.

Hetta má gjøgnumarbeiðast betri og fer vónandi ikki at síggja soleiðis út í endauppskotinum.

Sosiala og mentanarliga burðardygdin og fíggjarliga burðardygdin liggur í, at íbúgvar á staðinum hava ávirkan og fáa ágóðan av ferðavinnuni, eru við til at skapa tilboð og tænastur og fáa pening burturúr hesum eins og tey vita best, hvar man kann ganga og kenna góðu søgurnar kring landið. Hetta uppskotið er Top Down og ikki Buttom up, sum er tað vanliga kring heimin í dag og tað er sera óheppið.

Burðardygg ferðavinna er:

Destinatiónin verður borðin aftur í sama standi, sum tá man kom at vitja hana.

Regenerativ ferðavinna er.:

Regenerativ ferðavinna tryggjar at búskapurin frá gestinum gevur jaliga økonomi/inntøku til lokalsamfeløgini, umhvørvið og destinatiónina. Eisini at ferðavinnan leggur nakað jaligt eftir seg í náttúruni, t.d. voluntourism.

Hetta og tað er leiðin, restin av heiminum nú fer imóti. Eg upplivi enntá, at gestir spyrja, hvussu teir kunnu tryggja sær, at vit lata pening eftir okkum í bygdunum vit vitja.

Paragraf 18
Ordiliga gott, at cruise gestir nú eisini skulu gjalda Umhvørvisgjald. Eg haldi at 50% av hesum skuldi farið til kommunur 25% til Landsverk og 25% til íbúgvar. Hesir gestirnir fara næstan ongantíð í fjøllini, men vitja somu smáu bygdirnar allastaðni og stórur tørvur er á P-plássum til bussar, betri vegakervi, wc og skrell til hesar. Íbúgvar í hesum bygdunum burdu fingið 25% fyri órógvið.

Samanumtikið

Eg fegnist um, at Landsstýrismaðurin nú tekur ferðavinnuna og hennara avbjóðingar upp. Sakni tó at tilgongdin burdi verði meira lokalt forankrað og eisini fevndi um t.d. ferðslu á sjónum og manglandi vegakervi og fasilitetir í bygdunum kring landið.

Eg eri bangin fyri at hesin hætturin druknar í bureaukrati og fer at gera meg og aðrar ferðaleiðarar arbeiðsleysar.

Eg ynski at øll gongd hjá útlendinum uttanfyri bygdagøturnar skulu vera við føroyskum staðkendum ferðaleiðara, hetta er burðardygd fyri náttúru, íbúgvar og búskaparliga. Eg haldi eisini, at tá tað regnar á prest, má tað dryppa á dekn og eg havi onki ímóti at eitt gjald fellur til hagan, tá eg gangi í fjøllunum við útlendskum gestum fyri gjald.

Neyðugt er meira málrættað at hyggja eftir, hvar størstu avbjóðingarnar eru og har fara inn og finna loysnir. Fleiri staðni eru longu lokalar loysnir, sum rigga og tað er harmiligt at man fer inn top down og steðgar hesum, tað er ikki sosialt og fíggjarliga burðardygt.

Bara at taka gjald verjir onki, tó so, at tað gjørdi onki at man t.d. tók Parkeringsgjald við Múlafoss, har man gongur á grúsi fyri at síggja ein foss. Hetta síggja vit m.a. at man ger nógv í Islandi við náttúruattraktiónir.

Tí vóni eg, at tit hyggja enn einaferð eftir uppskotinum og tillaga tað, har tit serliga taka tey mest vitjaðu støðini við, her hugsi eg Kirkjubøur, Gásadalur, Bøur, Gjógv, Saksun, Tjørnuvík, Trøllanes og Mykines, sum eru mest vitjaðu støðini í dag.

Fari at enda við hesum citatinum.:

"Egin fíggjarlig áhugamál kunnu føra til áhaldandi neilig árin á náttúrutilfeingið. Vandamál, sum snúgva seg um burðardygd, gera tað tí neyðugt við politiskari uppílegging við eftirliti og reglum. Umhvørvisligar treytir eru grundleggjandi viðurskifti sum ikki kunnu kjakast um í fíggjarligum høpi, sum tó oftast er veruleikin" Hall 2008

Eg gleðist um, at vit í Føroyum nú eru á veg hendanvegin og tað er neyðugt, fyri at fáa hetta burðardygd.

Eg gleði meg at síggja endaliga úrslitið og vóni at vit seta náttúru og djóralív fyrst og fremst, síðani íbúgvar og trivnað og at enda fíggjarligu áhugamálini.

Vinarliga

Oda Wilhelmsdóttir Andreasen

Eigari av Fa Oda Wilhelmsdóttir (GoLocal.fo)